Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 5. oktober 2020
Mál nr.: 20/00421
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 3. Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í samtíðarskattalógini, og sum er 67 ár ella eldri ella fær fyritíðarpensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. Persónur, sum fær fólkapensjón, hevur tó ikki rætt til henda frádrátt. 2. stk. 14) 21) 26) Frádrátturin fyri giftar persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og giftar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, er 10.500 kr. 3. stk. 14) 21) 26) Frádrátturin fyri stakar persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og stakar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, er 16.200 kr. 4. stk. 19) 52) Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært lóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Í 2020 er	**§ 3.** Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í skattalógini, og sum er 67 ár ella eldri, fær fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. Persónur, sum fær fólkapensjón, hevur tó ikki rætt til henda frádrátt. *Stk. 2.* Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr. *Stk.* 3. Frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr. *Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið.

landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið. Í 2021 og fylgjandi ár er landsskattafrádrátturin upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið.	
§ 3. Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í skattalógini, og sum er 67 ár ella eldri, fær fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. Persónur, sum fær fólkapensjón, hevur tó ikki rætt til henda frádrátt. *Stk. 2.* Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr. *Stk.* 3. Frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr. *Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið.	**§ 3.** Persónur, sum fær fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. *Stk. 2.* Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr. *Stk.* 3. Frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr. *Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Landsskattafrádrátturin upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið.
	§ 1, nr. 1 hevur virknað frá 1. januar 2020 og fer úr gildi 1. januar 2021. § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2021.
	Broytingin, sum ber í sær, at ásetingin ikki er galdandi fyri persónar, sum eru 67 ár ella eldri, er bert galdandi fyri nýggj mál.